# Leiðsluskrivari

**Stjórnarskrivstovan**

Til Stjórnarskrivstovuna verður søkt eftir einum leiðsluskrivara. Stjórnarskrivstovan er ein stápur undir stjóranum, sum í fyrsta lagi skal vera leiðsluni til hjálpar, men hevur eisini fleiri umsitingarligar uppgávur fyri alla fyritøkuna, sum er í støðugari menning og broyting. Í løtuni arbeiða fýra fólk á Stjórnarskrivstovuni, sum m.a. hevur ábyrgdina av posti, journal, ávísum fundum, ferðing, vitjanum v.m., og sum er eitt stað, har tað mangan er lívligt – og eisini áhugavert.

**Arbeiðsuppgávur**
- Skrivari hjá nevndini: fyrireika nevndarfundir, samskipa tilfar, skriva fundarfrágreiðing, hava samskifti við nevndarlimirnar og taka sær av aðrari avgreiðslu.
- Skrivari hjá leiðsluni: fyrireika og samskipa leiðslufundir og fundartilfar, skriva fundarfrágreiðing og hava ymiska avgreiðslu um hendi fyri leiðsluna.
- Málsviðgerð
- Aðrar fyrisitingarligar uppgávur á Stjórnarskrivstovuni ella møguliga fyri aðrar deildir, tá tørvur er á tí.

**Førleikar og royndir hjá umsøkjarum**
- Skrivstovuútbúgving ella ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni
- Royndir við tílíkum arbeiði, eins og við vanligum skrivstovu- og umsitingararbeiði
- Góður málkunnleiki, serliga føroysk rættskriving og enskt. Neyðugt er at duga væl at málbera seg
- Teldukunnleiki á brúkarastigi
- At vera røkin og nærlagdur
- Almenn vitan

**Neyðugt er, at tann, ið sett/-ur verður,**
- hevur góð samstarvsevni
- megnar at hava nógv at gera og hava yvirlit yvir fleiri mál í senn
- er vakin og hevur áhuga fyri tí, sum fyriferst í fyritøkuni og í samfelagnum sum heild

Starvið verður lønt eftir førleika og annars sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Tele.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Honnu Simonsen ella Andras Róin á tel. 303030.

Umsóknir við avritum av prógvum v.m. skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. august 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYATELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697





Sosialurin - 311820

# Stóra bringu
## -ella lítla?

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610



# Tøting søkir eftir fólki til sølubúðina

Til sølubúð/avgreiðslu okkara søkja vit eftir einum fólki (m/k) at byrja skjótast gjørligt. Talan er um hálvtíðarstarv seinnapartar (20 tímar pr. viku). Til tíðir má tó roknast við, at arbeitt verður meira enn 20 t./ viku.

**Arbeiðið:**
- Avgreiða viðskiftafólk í sølubúðini
- Telefonansing, ordramóttøka
- Hjálpa til við avskipan av vørum
- Fakturering og smærri bókhaldsuppgávur

**Vit vænta:**
- At tú er fyrikomandi og hevur royndir innan søluarbeiði
- At tú hevur royndir við telduarbeiði
- At tú kennir nakað til fakturering/bókhald
- At tú er sjálvstøðug og fleksibul í tínum arbeiðslagi
- At tú hevur kunnleika til enskt/týskt

**Vit bjóða:**
- Eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv við ymsum arbeiðsuppgávum
- Eitt umhvørvi við støðugari nýskapan og menning
- Løn eftir avtalu

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hallberu Ó. Kristiansen á tlf. 44 10 20 ella 44 15 51. Skrivlig umsókn verður at senda innan 1. september 2000 til:

Töting

**Tøting p/f · 510 Gøta**
**Tel. 441020 · Fax 442091**
**e-mail: toeting@toeting.com**

Tøting p/f er eitt virki í støðugari menning, sum designar, framleiðir og selir tógv og pløgg úr 100% ull til føroyska og útlendska marknaðin. Á virkinum arbeiða uml. 12 fólk. Virksemið er í ávísan mun merkt av vertíðarsølu, tvs. serliga nógv er at gera um summarið og fram ímóti jólum.



# Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 20. august kl. 16.00 heldur Jónsvein Bech, prestur fyrilestur í bygdarhúsinum í Norðadali. »Hevur keltiskur kristindómur havt ávirkan í Føroyum?«

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn

1000



**Maskinmeistaraskúlin**
Undir Krákugjógv 5 • FO-100 Tórshavn
Tlf. 312661• Fax 318545
E-mail: **mms@mec.fo** Heimasíða: **www.mec.fo**

# Skeið í Kølitøkni

## Kølitøkni 3, framhaldsskeið

Innihald: **Elektronisk stýring og regulering.**
Adaptiv regulering við Danfoss AKC 114D herundir hándsetting. Etablering av kommunikatión millum Danfoss AKC 114D og PC gjøgnum gateway. Uppseting av datalogging.

Fortreytir: Skeiðið er ætlað kølimontørum og maskinfólkið, sum arbeiða og hava eftirlit við kommerciellum anleggum í t.d. supermarknaðum.
Skeiðið verður hildið í samstarvi við og við skeiðleiðara frá Maskinmeistaraskúlanum í Keypmannahavn.

Skeiðstað: Maskinmeistaraskúlin, Undir Krákugjógv 5.
Luttakaratal: Í mesta lagi 10.

Dagar: 5 dagar, 16. okt.–20. okt. 2000
Kostnaður: kr. 6.500,-

Tilmelding í seinasta lagi mánadagin 11. september 2000 á tlf. 312661 ella fax 318545




# Føroyar besta leitiøki

*BP Amoco vil komandi seks árini gera íløgur í Føroyum uppá umleið 180 mill. kr. og skal hetta vera við til at stimbra og menna føroyskt vinnulív at gerast kappingarført í altjóða høpi*

JAN MÜLLER

Undan handanini av leitiloyvum hevur stórur spenningur verið um, hvat og hvussu nógv eitt av heimsins størstu oljufeløgum, BP Amoco fór at fáa. Nú tað er greitt, at felagið er millum vinnarnar í Gullhorninum, er leitistjórin Peter Rattey sera væl nøgdur. -Vit fingu tað økið, sum vit fyrst og fremst høvdu søkt um, uttan at nakað varð latið øðrum av tí. Peter Rattey sigur, at teir eisini søktu um eitt annað økið men skilur hann væl Oljumálastýrið, sum vildi lata øðrum tað.

Tað hevur undrað onkran, at BP ikki hevur fingið økið tættast upp at markinum, sum liggur næst oljufeltunumm á bretskum øki. Peter Rattey sigur, at teir hava valt út teigarnar teir hava fingið við tí fyri eygað at gera eitt fund skjótast gjørligt, og hann dylur ikki fyri, at teir hava sett sær sum mál at bora næsta summar og raka við olju áðrenn árið er úti. Peter Rattey sigur, at tað teir leita eftir, er júst tað sama, sum teir hava funnið, har verandi keldur Foinaven og Schiehallion eru. Teir eru ómetaliga bjartskygdir og hóast føroyska økið er lítið sammett við t.d. Angola ella Meksikanska Flógvan, so liggur Føroyarøkið sera ovarliga á listanum hjá BP yvir positiv og lovandi øki.

BP Amoco hevur longu ein pall kláran til uppgávuna. Tað er Transocean Leader, sum væl egnaður til Føroyaøkið. Teir eru tó í løtuni í samráðingum við hini feløgini, sum hava fingið leitiloyvi um saman at finna ein annan pall. Stórur eftirspurningur er eftir boripallum og finna feløgini saman ikki ein boripall, so verður tað Transocean Leader, sum fer at bora fyri BP.

Leitistjórin sigur, at hann tekur ikki munnin ov fullan, tá hann undirstrikar, at leitiøkið teir hava fingið atgongd til á føroyska landgrunninum er eitt tað mest týdningarmikla hjá BP í øllum heiminum. Teir síggja annars stórar møguleikar í øllum økinum niðri í landsynningshorninum eins og á økjunum hinumegin markið.

– Vit rokna við at finna eitt ella tvey oljufelt á stødd við Schiehallion á teigunum vit nú hava fingið tillutað. Hetta er eitt felt uppá umleið 500 mill. tons av olju.

Peter Rattey sigur, at fleiri onnur feløg hava fríggjað til BP, sum tó hevur gjørt greitt, at tað vil vera einsamalt um uppgávuna.

### Stór íløguætlan

Felagið hevur annars í umsóknini sagt seg vilja stuðla føroyskum virksemi. -Vit eru sinnaðir til at gera íløgur í Føroyum komandi árini uppá umleið 24 mill. dollarar tvs. umleið 180 mill. kr. Her er talan um eitt íløguprogramm næstu seks árini, sum hevur til endamál fyrst og fremst at stimbra føroyskan ídnað til at gerast kappingarførur í heimshøpi. Teir hava lovað Oljumálastýrinum at finna nøkur føroysk feløg, einar 3-5 fyritøkur, sum BP kann vera við til at lyfta upp á eitt støði, har tær kunnu vera kappingarførar á heimsmarknaðinum. Ein av hesum fyritøkum kann væl gerast Føroya Tele, hóast BP ikki endaliga hevur gjørt nakað av. Talan er um at kunna leggja ein „fiberoptic" KT-kaðal millum Hetland og Føroyar via verandi oljufeltini Foinaven og Schiehallion. Hetta kann so vera grundarlagið undir einum KT-ídnaði í Føroyum.

– Kunnu vit vera við til at stimbra føroyskar fyritøkur, so er hetta júst tað vit vilja brúka pengar til sigur Peter Rattey og vísir sum eitt dømi á, hvat tað t.d. vil siga fyri Føroyar og oljuídnaðin, um Atlantic Airways t.d. hevði fasta rutu hvønn dag millum Føroyar og Glasgow!

Nakað av pengunum, sum BP vil lata til føroyska samfelagið verður koyrt í ein grunn, sum Oljumálastýrið hevur mælt til. Hann vísir á, at BP ætlar ikki einsamalt at gera av, hvat pengarnir teir vilja investera her skulu brúkast til. Tað má gerast í tøttum samstarvi við føroyskar myndugleikar.



*Ein væltalandi og fegin Peter Rattey rósti føroysku oljumyndugleikunum fyri at hava verið dugnaligar, rættvísar og ærligar. Her handar Eyðun Elttør BP stjóranum loyvið*

Stjóri hjá BP Amoco í Føroyum er Hjarnar Djurhuus, sum í stuttari viðmerking sigur seg vera væl nøgdan við úrslitið. Hann sigur, at hetta er orsakað av tí professionalismu og seriøsiteti, sum BP fólk leggja fyri dagin.

# Føroya Kolvetni tekna partapening

JAN MÜLLER

Millum tey væl nøgdu feløgini eftir 1. útbjóðing til oljuleiting eru tey bæði føroysku feløgini, Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni. Í gjár fegnaðist stjórin í Atlants Kolvetni, Vilhelm Petersen um loyvið bólkurin teir eru við í, hevði fingið. Og í dag fegnast nevndarformaðurin í Føroya Kolvetni, Graham Steward um loyvini, sum bólkurin teir eru við í fekk. Talan er um stóra italska felagið Agip, ið hevur verið virkið í Føroyum nú í fleiri ár. Graham Steward er nøgdur við gongdina í oljumálinum, og at teir hava fingið 7% part í loyvinum hjá Agip.

Hann vísir á, at teir hava møguleika at hækka hetta prosentið til eitt 2-siffrað tal. -Vit byrja við sjey og so fáa vit at síggja, hvussu tað gongur sigur ein vælhýrdur hálvur føroyingur, sum nú má sigast at hava annað beinið í oljuvinnuni í Bretlandi og hitt í oljuvinnuni við Føroyar. Hann starvast dagliga sum stjóri í oljufelagnum Dana, ið samstarvar við Føroyar Kolvetni.

Nú Føroya Kolvetni er komið sær uppí bólk við Agip og Marathon hevur tikið seg úr bólkinum vil Graham Steward ikki útiloka, at onnur ella annað felag eisini kann koma upp í teirra bólk.

Í gjár vísti stjórin í hinum føroyska oljufelagnum á, at tað bara finst eitt veruligt føroyskt oljufelag og metti hann Føroya Kolvetni meira sum eitt umboð fyri útlendskan kapital. Graham Steward hevur ongan hug at fara út í tjak um hetta, tí nú skal arbeiðast, sum hann málber seg, men hann er ikki samdur við Vilhelm Petersen á hesum øki.

Hann vísir á, at fleiri føroyingar eru við í felagnum, og nú er so møguleiki hjá uppaftur fleiri føroyingum at vera við, tí farið verður undir at tekna nýggjan partapening. Ætlanin er at tekna nógvan partapening. – So fer tíðin at vísa, hvussu nógvir føroyingar vilja vera við. Vónandi vilja fleiri síggja hetta sum ein góðan íløgumøguleika, sum tó sjálvandi hevur váða við sær. Felagið skuldi uppbyggjast frá byrjan av bæði við føroyskum og útlendskum kapitali. Vit hava valt ta leiðina og halda tað vera skilagott.

Graham Steward sigur, at stórur áhugi er í útlandinum fyri Føroya Kolvetni. Teir fáa fyrispurningar frá bæði bankum, privatum osfr. Nevndarformaðurin í Føroya Kolvetni heldur teir hava verið sera óhepnar nú í eina tíð, men hava nú loyst flestu trupulleikarnar. Og teir eru sera væl nøgdir við at vera partur av Agip-samtaki.

Herfyri máttu jarðfrøðiligu ráðgevararnir hjá Føroya Kolvetni, SAGEX í Noregi taka aftur ráðgevingina, tí ein dómstólur setti fútaforboð móti hesum. Síðani er tað hent, at ein annar dómstólur hevur fríkent teir men nú skal so Hydro, sum upprunaliga fór í rættin við Sagex-fólkunum, hava biðið um at fáa málið fyri Hægstarætt.

Graham Steward fær ikki sagt, hvussu støðan er millum teir og Sagex-fólkini. Hann sigur bara, at nógv er hent, og tað er nógv, sum skal takast til eftirtektar. -Hetta hevur verið ein kompliserað tíð sigur hann men vil ikki siga, um Sagex framvegis er inni í hitanum. Vit revidera støðuna. Vit tosa saman osfr. Men eg kann ikki siga nú, hvussu støðan er. Føroya Kolvetni leitar nú eftir føroyskum starvsfólki, í fyrsta lagi einum ungun jarðfrøðingi. Teir ætla tó ikki at seta eina rúgvu av fólki, tí teir eru ikki operatørur. -Vit eru sera væl nøgdir, positivir og bjartskygdir leggur hann aftrat.

– Vit ætla nú at byggja upp eitt føroyskt felag. Hetta er byrjanin. Hetta er ikki ætlað sum nakar løtuvinningur. Vit eru komnir fyri at verða verandi í Føroyum sigur Graham Steward og við hesum vil vísa aftur teimum røddum, sum siga, at Føroya Kolvetni og samstarvsfelag tess Dana bara eru úti eftir einum skjótum »gevinsti« í Føroyum, selja tað man hevur fingið tillutað og so rýma.

### Agip væl nøgt

Fleiri umboð fyri Agip vóru til steðar í Norðurlandahúsinum, tá loyvini vórðu latin. Stjórin í Agip sigur við Sosialin, at teir eru væl nøgdir við loyvini teir hava fingið tillutað. At Marathon ikki er við longur er so bara ein nýggjur møguleiki hjá teimum, sum eru eftir í bólkinum. Uppá fyrispurning um teir eru sinnaðir at taka onnur feløg upp í bólkin, nú Agip eitt nú hevur 93% av lisensinum sigur stjórin í Agip, at um hetta kann gagna samtakinum, so er hetta ikki óhugsandi. Við gagna meinar hann, at eitt felag kann koma inn við vitan, ekspertisu og til viðgerð av data og bidraga nakað til bólkin.

Agip var annars saman við Norsk Hydro í eini aðrari umsókn. Men har var eydnan so ikki við teimum. Teir høvdu annars eitt gott samstarv sigur Agipstjórin og vísir ikki aftur, at teir eru sinnaðir at tosa við Norsk Hydro um luttøku í tí lisensi teir nú hava fingið.



*Umboð fyri Agip og Føroya Kolvetni lyfta í felag – her samna við oljumálaráðharranum*